Kappingareftirlitið

Advokatfelagið
Lucas Debesar gøta 8
100 Tórshavn

Att: Ingi Højgaard, adv.

Tórshavn, 24. juli 2023
Mál.nr: 23/00247

# Sp/F Frá 27. Juni 2007 yvirtekur partabrøvini hjá Skel Fjárfestingafélag HF í Sp/F Orkufelagið

## 1. Samandráttur

1. Kappingareftirlitið fekk tann 17. apríl 2023 fráboðan um, at Sp/F 27. Juni 2007 hevði ætlan um at keypa partabrøvini hjá Skel Fjárfestingafélag HF í Sp/F Orkufelagið. Fráboðanin var fullfíggjað tann 24. apríl 2023.

2. Yvirtøkan er fevnd av fráboðanarskylduni í §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí talan er um yvirtøku sambært §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og tí umsetningsmørkini í §14, stk. 1, nr. 1 eru nádd.

3. Sambært viðtøkum felagsins hevur Sp/F Orkufelagið til endamál at eiga partapening í øðrum feløgum, stovna og reka orkukeldur, gera íløgur og annað virksemi í hesum sambandi. Í 2021 keypti Sp/F Orkufelagið partapeningin í P/F Magn.

4. P/F Palli hjá Mariannu eigur partapeningin í Sp/F Frá 27. Juni 2007. Høvuðsvirksemið hjá P/F Palli hjá Mariannu, sum eisini verður kallað Christian í Grótinum samtakið, er at reka reiðaravirksemi í uppisjóvarvinnuni. Felagið hevur eisini gjørt íløgur í aðrar vinnugreinar.

5. Í sambandi við eftirkanning av hesi yvirtøku hevur Kappingareftirlitið kanna øll viðurskifti, men hevur serliga valt at leggja dent á at kanna marknaðin fyri sølu av brennievni í Føroyum, tí tað er á hesum marknaði, at virksemið hjá luttakandi fyritøkum umskarast mest, og har Kappingareftirlitið áður hevur víst á, at talan er um ein marknað við avmarkaðari kapping.

6. Tann 9. juni 2023 tók Kappingareftirlitið avgerð um, at neyðugt var at kanna yvirtøkuna nærri sambært § 17, stk. 1 í kappingarlógini. Orsøkin fyri hesum var, at yvirtøkan hevur við sær, at ávíst eigarasamanfall verður á føroyskan oljumarknaðinum eftir ætlaðu yvirtøkuna.

7. Eftir at hava kannað yvirtøkuna nærri, er Kappingareftirlitið komið til ta niðurstøðu, at yvirtøkan ikki munandi kemur at ávirka kappingina á føroyska oljumarknaðinum.

8. Niðurstøðan hjá Kappingareftirlitinum er millum annað grundað á, at marknaðarbýti og miðsavnanin verður hin sama eftir ætlaðu yvirtøkuna, at Sp/F Frá 27. Juni 2007 ikki einsæris hevur ræði í hvørki Sp/F Orkufelagið, P/F Tjaldur ella P/F Effo, at yvirtøkan ikki kemur at gera tað torførari hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi á føroyska oljumarknaðinum og at restin av eigarasamanfallinum á føroyska oljumarknaðinum annars er avmarkað.

### Tilmæli

9. Kappingareftirlitið mælir tískil Kappingarráðnum til at góðkenna yvirtøkuna vísandi til § 15, stk. 1 í kappingarlógini. Sambært ásetingini skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

## 2. Málslýsing

### 2.1. Inngangur

10. Kappingareftirlitið fekk tann 17. apríl 2023 fráboðan um, at Sp/F Frá 27. Juni 2007 hevði ætlan um at keypa partabrøvini hjá Skel Fjárfestingafélag HF í Sp/F Orkufelagið. Fráboðanin var fullfíggjað tann 24. apríl 2023.

11. Sp/F Orkufelagið eigur allan partapeningin í P/F Magn. P/F Palli hjá Mariannu eigur partapeningin í Sp/F Frá 27. Juni 2007.

12. Yvirtøkan er fevnd av fráboðanarskylduni í §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí talan er um yvirtøku sambært §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og tí umsetningsmørkini í §14, stk. 1, nr. 1 eru nádd.

13. Talan er um yvirtøku sambært §13, stk. 1, pkt. 2 í kappingarlógini, tá ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræði á minst einari fyritøku, ella tá ein ella fleiri fyritøkur við keyp av pørtum ella ognum, gjøgnum avtalu ella á annan hátt, fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av eini ella fleiri fyritøkum afturat.

14. Sambært § 14, stk. 1, nr. 1-2, eru umsetningsmørkini nádd, um luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava ein árligan umsetning upp á í minsta lagi 75. mió. kr. í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkum, hvør sær, hevur ein samlaðan árligan umsetning uppá 15. mió. kr. í Føroyum, ella minst ein av luttakandi fyritøkum hevur ein árligan umsetning í Føroyum uppá 75 mió. kr., og minst ein av hinum fyritøkunum hevur ein umsetning uppá 75. mió. kr. á heimstigi.

15. Umsetningurin hjá luttakandi feløgunum í 2021 var:

| Luttakandi fyritøkur | Umsetningur í Føroyum í 2021 (mío. kr.) | Umsetningur á heimsstigi í 2021 (mió. kr.) |
|---|---|---|
| P/f Magn | [...] | [...] |
| P/F Palli hjá Mariannu | [...] | [...] |

16. Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, so hava minst tvær av luttakandi fyritøkum ein umsetning, sum er omanfyri 15 mió. kr., og luttakandi fyritøkur hava ein samlaðan umsetning, sum er omanfyri 75 mió. kr.

17. Talan er sostatt um yvirtøku, sum er fevnd av fráboðanarskylduni í §16, stk. 1 í kappingarlógini.

18. Yvirtøkan er fráboðað eftir vanligum leisti, sambært § 2, stk. 2 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 um fráboðan av samanleggingum.

### 2.3. Yvirtøkan og luttakandi fyritøkur

19. Sambært keypsavtalu, dagfest tann 15. februar 2023, verður yvirtøkan framd við at SKEL Fjárfestingafélag HF selur øll síni partabrøv **[...]** (nom.kr. **[...]**) í Sp/F Orkufelagið til Sp/F Frá 27. Juni 2007 fyri ein samlaðan søluprís á **[...]** kr.

20. Partabrøvini hjá Skel Fjárfestingafélag HF. í Sp/F Orkufelagið svara til 48,25% av samlaðu partabrøvunum í Sp/F Orkufelagið.

21. Í sambandi við søluna fingu verandi partaeigarar í Sp/F Orkufelagið møguleika at gera forkeypsrætt galdandi. **[...]** partaeigarar valdu at gera forkeypsrætt galdandi, og keyptu hesir tilsamans **[...]** partabrøv fyri **[...]** kr.

22. Forkeypsrætturin merkir, at Sp/F Frá 27. Juni 2007 keypir **[...]** partabrøv (nom. kr. **[...]**) frá Skel Fjárfestinafélag í Sp/F Orkufelagið fyri ein samlaðan søluprís á **[...]** kr.

23. Eftir yvirtøkuna kemur Sp/F Frá 27. Juni 2007 at eiga 41,71% av partabrøvunum í Sp/F Orkufelagið.

24. Sambært keypsavtaluni, er ein kappingaráseting áløgd seljara. Kappingarásetingin hevur við sær, at seljarin næstu tvey árini, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis má hava virksemi í Føroyum, sum er í kapping við virksemið hjá Sp/F Orkufelagið. Kappingareftirlitið metir, at kappingarásetingin er innanfyri siðvenjuna hjá Kappingarráðnum á økinum.

25. **<u>Sp/F Orkufelagið</u>**

26. Sp/F Orkufelagið var stovnað í 2021 og er endamál felagsins at stovna og reka orkukeldur, gera íløgur og annað virksemi í hesum sambandi.

27. 32 eigarar eru í Sp/F Orkufelagið. Talan er bæði um einstaklingar, fyritøkur, íløgufeløg v.m. Eigararnir eru bæði úr Føroyum og uttanlands, men er ein stórur meiriluti úr Føroyum.

28. Lutfalsliga stórur munur er á eigaralutfallinum í Sp/F Orkufelagið. Eftir ætlaðu yvirtøkuna verður Sp/F Frá 27. Juni 2007 størsti parteigari við 41,71%. Ognarluturin hjá næststørsta parteigara, Sp/F Arcus Invest er **[10-20]**%. 5 parteigarar eiga millum **[0-5]**% og **[5-10]**%, meðan 25 parteigarar eiga millum **[0-5]** og **[0-5]**%.

29. Sp/F Orkufelagið keypti tann 30. desember 2021 allan partapeningin í P/F Magn við tilhoyrandi dótturfeløgum. Kappingareftirlitið metti ikki, at yvirtøkan var fráboðanarskyldug sambært § 16, stk. 1 í kappingarlógini, tí SKEL Fjárfestingafélag HF við sínum ognarlut á 48,3% saman við loyalitetsásetingum í lániavtalum við tíggjar av størru íleggjarunum í Sp/F Orkufelagið, framvegis kom at hava ræði í Sp/F Orkufelagið.

30. Í talvuni niðanfyri sæst samtøkuyvirlit fyri Sp/F Orkufelagið:




31. Demich eigur 20 % av partabøvinum, Jarðhiti eigur 40 % egin partabrøv

32. Sp/F Orkufelagið eigur 100% av partabrøvunum í P/F Magn. Virksemið hjá P/F Magn fevnir um innflutning og sølu av brenniolju til sethús, virkir, akfør og skip umframt smyrjiolju, tænastur og tænastulutir til miðstøðuhita. 10 brennievnisstøðir verða riknar undir navninum Magn.

33. P/F Magn eigur 100% av P/F Demich, sum fast við sølu, framleiðslu og handverk innan HVS, blikksmíð og el. P/F Demich eigur 33,33% av P/F Jarðhiti, sum m.a. ger jarðhitaboringar.

34. P/F Magn eigur 100% av Sp/F Bærentsen, sum er brennievnisstøð í Vági.

35. Harumframt eigur P/F Magn 40% av P/F Flatnahagi sum hevur til endamáls at gera íløgu í og reka vindmyllund í Flatnahaga.

36. Finn Jakobsen er stjóri í Sp/F Orkufelagið og P/F Magn

37. Niðanfyri er yvirskipað lýsing av fíggjarligu gongdini hjá P/F Magn árini 2019-2021. Tølini eru úr almennu roknskapunum hjá felagnum:

| P/F Magn | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 149.714 | 133.743 | 128.354 |
| EBITDA | 79.176 | 61.915 | 66.650 |
| Ársúrslit | 44.288 | 31.606 | 36.326 |
| Ogn - Tilsamans | 339.910 | 315.552 | 309.735 |
| Eginpeningur | 101.471 | 79.683 | 141.077 |
| Eginpen. avkast | 54 | 50 | 32 |
| Trygdarevni | 30 | 25 | 46 |

38.

39. **<u>Sp/F Frá 27. Juni 2007 (P/F Palli hjá Mariannu)</u>**

40. Høvuðsvirksemið hjá Sp/F Frá 27. Juni 2007 er at gera íløgur og eiga partabrøv í øðrum feløgum. Sp/F Frá 27. Juni 2007 er dótturfelag hjá P/F Palli hjá Mariannu og inngongur felagið í samtøkuroknskapinum hjá P/F Palli hjá Mariannu.

41. Tað er Kristian Martin Rasmussen, sum saman við synunum eigur P/F Palli hjá Mariannu. Felagið varð stovnað í 1971.

42. Jan Petersen, er stjóri í P/F Palli hjá Mariannu.

43. Høvuðsvirksemið hjá P/F Palli hjá Mariannu, sum eisini verður kallaða Christian í Grótinum samtakið, er at reka reiðaravirksemi í uppisjóvarvinnuni.

44. Til P/F Palli hjá Mariannu eru hesi dótturfeløg atknýtt:

| Atknýtt dótturfeløg | Ognarlutur |
|---|---|
| P/F frá 5. Juni 1992 | 100% |
| Sp/F Amarant | 100% |
| Sp/F Frá 27. Juni 2007 | 100% |

45.

46. P/F frá 5. Juni 1992, eigur 100% av P/F Hvalnes, sum eigur verksmiðjuskipið M/S Norðborg. Harumframt eigur felagið 100% av P/F Christian í Grótinum, sum eigur uppisjóvarskipið M/S Christian í Grótinum.

47. Sp/F Amarant rekur bakaravirksemi og annan handil í hesum sambandi.

48. Sp/F Frá 27. Juni 2007 eigur 9% av P/F Gist og Vist, sum m.a. rekur gistingarhús, matstovur og kaffistovur v.m. Harumframt eigur felagið Sp/F Matr.nr. 986a, sum rekur virksemi við útleigan av fastogn. Eftir ætlaðu yvirtøkuna kemur Sp/F Frá 27. Juni 2007 at eiga 41,71% í Sp/F Orkufelagið.

49. P/F Palli hjá Mariannu eigur eisini ognarlut í hesum leyst atknýttu feløgum:

| Felag | Ognarlutur |
|---|---|
| P/F North Pelagic | 50% |
| Larsen Danish Seafood GmbH | 100% |
| Sp/F Vesturskin | 33% |
| P/F Í Ánunum | 50% |
| Sp/F Nemlia | 19% |
| Sp/F Defined Energy | 33% |
| Sp/F 17.01.2019 | 33% |
| P/F Tjaldur | 8% |
| Sp/F 01.05.2018 | 50% |
| P/F LGS | 37,6% |
| 50. P/F Pelagos | 30,0% |

51. Í mun til leyst atknýttu feløgini skal leggjast til merkis, at P/F Palli hjá Mariannu eigur 8% av partapeninginum í P/F Tjaldur. Harumframt eiga eigararnir av P/F Palli hjá Mariannu við feløgunum, KMR Invest Sp/f, ER Invest Sp/f og BR Invest Sp/F, hvør síni 1,87% av kapitalinum í P/F Tjaldur.

52. Hetta merkir, at eigararnir av P/F Palli hjá Mariannu eiga 15,48% av partapeninginum í P/F Tjaldur, frammanundan ætlaðu yvirtøkuni.

53. Sambært ársroknskapinum hjá P/F Effo fyri 2022, hevur P/F Tjaldur og Kolan Aps avgerandi ávirkan á P/F Effo. P/F Tjaldur eigur 100 % av Sp/F Kolan, sum eigur 68,51 % av Kolan Aps. Restina av Sp/F Kolan eigur felag hjá Gullak Madsen í Hirtshals.

54. Hóast talan ikki er um beinleiðis eigarasamanfall, so hevur fráboðari upplýst Kappingareftirlitinum, at stjórin í Christian í Grótinum samtakinum, Jan Petersen, gjøgnum felagið Sp/F ÓMC eigur 100 % av Sp/f Í Mittúni og Sp/f North Invest. Sp/f Í Mittúni eigur m.a. bygningin har Effo-støðin í Leirvík heldur til, men eigur P/F Effo olju og bensin tangarnar. Sp/F North Invest leigar bygningin á Strondum frá P/F Effo, har Effo støðin á Strondum heldur til. Felags fyri bæði Effostøðina í Leirvík og á Strondum er, at hesar virka sum matvøruhandlar.

55. Niðanfyri er yvirskipað lýsing av fíggjarligu gongdini úr samtaksroknskapinum fyri P/F Palli hjá Mariannu árini 2019-2021. Tølini eru úr almennu roknskapunum hjá felagnum:

| P/F Palli hjá Mariannu (samtak) | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| Nettosøla | 390.964 | 331.133 | 440.232 |
| EBITDA | 86.740 | 106.311 | 99.201 |
| Ársúrslit | 101.199 | 66.743 | 99.553 |
| Fíggjarstøðujavni | 1.196.486 | 914.243 | 1.039.234 |
| Eginpeningur | 811.087 | 720.009 | 669.965 |
| Eginpen. avkast | 13,2 | 9,6 | 15,1 |
| Trygdarevni | 67,8 | 78,8 | 64,5 |

## 2.4. Viðkomandi marknaðir

56. Tá metast skal um, hvørt ein yvirtøka kann avmarka kappingina á marknaðinum, er neyðugt, at skilmarka tann marknað ella teir marknaðir, sum yvirtøkan fær ella kann fáa ávirkan á. Skilmarkingin av viðkomandi marknaði fevnir bæði um viðkomandi vørumarknað og viðkomandi landafrøðiliga marknað.

57. Endamálið við at skilmarka viðkomandi vøru- og landafrøðiliga marknað er til tess at staðfesta, hvørjir kappingarneytar kunnu leggja luttakandi fyritøkur undir kappingarligt trýst, soleiðis at hesar ikki kunnu virka óheft á marknaðinum.

58. Viðkomandi vørumarknaður fevnir um tær vørur og tænastur, sum brúkarin metir kunnu koma í staðin fyri hvørja aðra, orsakað av teirra eyðkennum, prísum ella nýtslu.

59. Viðkomandi landafrøðiligi marknaður fevnir um tey øki, har luttakandi fyritøkur virka, og har kappingarligu umstøðurnar eru somikið eins, og sum skilja seg frá kappingarumstøðum í grannaøkjum.

60. Í § 5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði.

61. Fráboðari metir at tveir viðkomandi vørumarknaðir kunnu skilmarkast í mun til samanleggingina. Hesi eru viðkomandi vørumarknaður fyri sølu av brennievni og øðrum tænastum í hesum sambandi og viðkomandi vørumarknaður fyri sølu av HVS – herundir hitapumpur og jarðhiti. Kappingareftirlitið metir harnæst, at marknaðurin fyri sølu og framleiðslu av orku frá vindmyllum eisini kann skilmarkast í mun til hesa samanlegging.

62. Eftir at hava kanna øll viðkomandi viðurskifti og hóast at fleiri viðkomandi marknaðir kunnu skilmarkast, hevur Kappingareftirlitið í mun til viðgerð av hesi samanlegging serliga valt at leggja dent á at kanna, hvørt samanlegging kann hava ávirkan á viðkomandi marknað fyri sølu av brennievni og øðrum tænastum í hesum sambandi. Orsøkin fyri hesum er, at Kappingareftirlitið í longri tíð hevur mett, at kappingin á føroyska oljumarknaðinum er avmarkað og metir Kappingareftirlitið tí, at kannast má, hvørt eigarasamanfallið, sum verður í báðum oljufeløgunum eftir ætlaðu yvirtøkuna, kann hava óhepnar avleiðingar fyri kappingina á føroyska oljumarknaðinum.

63. Viðkomandi vørumarknaðurin fyri sølu av brennievni og øðrum vørum í hesum sambandi er lítið fjølbroyttur á veitarasíðuni. Talan er um ein duopol marknað, har P/F Magn og P/F Effo hava umleið helmingin av marknaðinum hvør.

64. Í mun til eftirspurningsvarasetingina kann marknaðurin býtast út á sølu av brennievni og øðrum tænastum í hesum sambandi til privat, og søla av brennievni og øðrum tænastum í hesum sambandi til vinnu. Hesir marknaðir kunnu skilmarkast nærri, t.d. við at skilmarka út á einstøku brennievnini.

65. Í mun útboðavarasetingina og grøna orkuskiftið, sum stendur fyri framman, metir Kappingareftirlitið, at grundgevast kann fyri, at søla av hitapumpum kann varasetast í mun til sølu av oljufýringum. Hetta sæst millum annað aftur í stuðulsskipanum hjá landinum og øktu søluni av hitapumpum seinnu árini. Í Føroyum eru fleiri veitarar av hitapumpum.

66. Kappingareftirlitið metir, at byrjunarkostnaðurin hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi á føroyska oljumarknaðinum er lutfalsliga høgur. Sambært fráboðara er íløgan í tangar og tangabil áleið 30. mió. Umframt hetta krevst fígging til m.a. bygningar og rakstur. Kappingareftirlitið metir tó, at íløgukostnaðurin at byrja virksemi á smásøluliðnum við t.d. ómannaðum støðum er lutfalsliga lægri, men til hetta krevst avtala um veiting av olju frá verandi aktørum.

67. Kappingareftirlitið metir at marknaðurin fyri sølu av brennievni og tænastum í hesum sambandi í stóran mun landafrøðiliga kann skilmarkast til Føroyar. Í ávísan mun kann grundgevast fyri, at marknaðurin kann skilmarkast breiðari, tá fiskiskip, sum fiska á fjarðleiðum, kunnu bunkra aðrastaðnis enn í Føroyum.

### Viðkomandi marknaður fyri sølu av brennievni í Føroyum

68. Føroyski marknaðurin fyri sølu av brennievni er skipaður sum eitt duopol. Feløgini á marknaðinum eru P/F Magn og P/F Effo. Høvuðsvirksemið hjá báðum feløgum er fyrst og

fremst at selja sethúsum, virkjum, akførum og skipum brenniolju. Tó sæst, at feløgini eru byrjaði at fyrireika seg til grøna orkuskifti m.a. við íløgum í feløgunum, sum framleiða ravmagn úr varandi orkukeldum.

69. Niðanfyri er gjørd yvirskipað lýsing av báðum oljufeløgunum og føroyska oljumarknaðinum.

## 70. P/F Magn

71. P/F Magn hevur havt virksemi í Føroyum undir ymiskum eigarum og vørumerkjum í nærum 100 ár. Í byrjanini var felagið umboð fyri Dansk Shell í Føroyum, men seinni varð felagið umskipað til at vera deild í Dansk Shell.

72. Í 2007 varð felagið keypt av føroyskum felag, og navnið broytt til P/F Føroya Hedda. Sama ár varð P/F Føroya Hedda selt íslenskum felag og hevur felagið fram til 2021 verið á íslendskum hondum.

73. Felagið hevur síðan 2009 borið navnið P/F Magn.

74. Í desember 2021 keypti Sp/F Orkufelagið allan partapeningin í P/F Magn við tilhoyrandi dótturfeløgum frá SKEL Fjárfestingafélag HF. Kappingareftirlitið metti ikki, at yvirtøkan var fráboðanarskyldu sambært § 16, stk. 1 í kappingarlógini, tí SKEL Fjárfestingafélag HF við sínum ongarluti á á 48,3% saman við loyalitetsásetingum í lániavtalum við tríggjar av størru íleggjarunum í Sp/F Orkufelagið, framvegis kom at hava ræði í Sp/F Orkufelagið.

75. Høvuðsvirksemið hjá P/F Magn er innflutningur, heilsøla og smásøla av gassolju, diesel og bensin. Harumframt hevur P/F Magn virksemi innan sølu, uppseting og viðlíkahald av oljufýringum. Eisini hevur felagið virksemi innan sølu av dagligvørum, kioskvørum og bilvørum. 11 brennievnisstøðir verða riknar undir Magn navninum.

76. Í 2018 keypti P/F Magn meirilutan í P/F Demich.[1] P/F Demich fast við sølu, framleiðslu og handverk innan HVS, blikksmíð og el. Í 2022 keypti P/F Magn restina av partabrøvunum í P/F Demich.

77. P/F Magn og P/F Lív eiga umvegis P/F Flatnahagi vindmyllulundina í Flatnahaga.

78. Í talvuni niðanfyri sæst fíggjarliga gongdin í felagnum árini seinastu 5 árini:

| P/F Magn (tkr.) | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 1.493.140 | 893.496 | 667.338 | 923.832 | 850.064 |
| Bruttovinningur | 157.869 | 149.714 | 133.743 | 128.354 | 120.309 |
| EBITDA | 91.347 | 79.176 | 61.915 | 66.650 | 60.787 |
| Ársúrslit | 48.187 | 44.288 | 31.606 | 36.326 | 30.370 |
| Ogn - Tilsamans | 412.638 | 339.910 | 315.552 | 309.735 | 346.567 |
| Eginpeningur | 9.258 | 101.471 | 79.683 | 141.077 | 137.885 |
| Eginpen. avkast | 665 | 54 | 50 | 32 | 28 |
| Trygdarevni | 2 | 30 | 25 | 46 | 40 |
| Tal á starvsfólki | 87 | 88 | 82 | 80 | 77 |
| 79. Vinningsbýti | 172.200 | 27.750 | 93.000 | 33.134 | 0 |

## 80. P/F Effo

81. Hin veitarin á føroyska oljumarknaðinum er P/F Effo. Felagið hevur verið á føroyska marknaðinum í nógv ár og hevur virknað undir ymiskum nøvnum og eigarum.

[1] 18/00085 – P/F Magn keypir P/F Demich

82. Í 2007 keypti Ognarfelagið Megd P/f Statoil Føroyar frá Den Norske Stats Oljeselskap í Noregi, sum átti allan partapeningin í Statoil Føroyar P/f.

83. Megd P/f var eitt samtak av føroyskum íløgufeløgum. Statoil Føroyar skifti í tí sambandi navn til Mentir P/f, men marknaðarførdi kortini sínar vørur og tænastur undir vørumerkinum hjá Statoil. Feløgini Mentir P/F og Ognarfelagið Megd P/F vórðu løgd saman í eitt felag, og í 2009 skifti felagið navn til Effo P/f.

84. Um sama mundið sum Statoil Føroyar kom á føroyskar hendur, keypti Ognarfelagið Megd eisini allan partapeningin í Faroe Bunkers P/f í Fuglafirði, sum tá fyrireikaði sølu av tungari olju í Føroyum.

85. Í mun til eigaraviðurskifti, so framgongur av ársroknskapinum hjá P/F Effo fyri 2022, at P/F Tjaldur og Kolan Aps hava avgerandi ávirkan á P/F Effo.

86. Høvuðsvirksemi hjá P/F Effo er innflutningur, heilsøla og smásøla av gassolju, tungolju, diesel og bensin. Harumframt hevur P/F Effo virksemi við sølu, uppseting og viðlíkahald av oljufýringum. Eisini hevur felagið virksemi innan sølu av dagligvørum, kioskvørum og bilvørum. 9 brennievnisstøðir verða riknar undir Effo navninum umframt 4 ómannaðar pumpustøðir.

87. P/F Effo eigur 100% av partapeninginum í P/F Effo Bunkers sum rekur tungoljuterminal í Fuglafirði. Harumframt eigur felagið 50% av vindorkufelagnum P/F Vindrøkt, sum rekur vindmyllulund á Mýrunum í Vestmanna og í Gellingarkletti, Tórshavn, og 51% av Carls Jensens Marinelager Aps.

88. Í mai 2023 kunngjørdi P/F Effo at felagið var farið undir at selja hitapumpur av merkinum Thermia, har P/F Svend Krosstein er undirveitari. Umframt veiting av hitapumpum bjóðar P/F Effo eisini boring av jarðhitaholum.

89. Í talvuni niðanfyri sæst fíggjarliga gongdin í felagnum seinastu 5 árini:

| P/F Effo (tkr.) | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 1.598.825 | 972.190 | 770.181 | 920.364 | 907.575 |
| Bruttovinningur | 148.198 | 136.903 | 138.973 | 130.124 | 120.115 |
| EBITDA | 69.607 | 64.643 | 63.281 | 60.146 | 55.526 |
| Ársúrslit | 39.793 | 39.502 | 39.812 | 37.327 | 33.927 |
| Ogn - Tilsamans | 432.102 | 358.121 | 278.677 | 279.723 | 313.920 |
| Eginpeningur | 121.762 | 110.516 | 99.559 | 153.719 | 134.111 |
| Eginpen. avkast | 42 | 46 | 51 | 30 | 31 |
| Trygdarevni | 28 | 310 | 36 | 55 | 43 |
| Tal á starvsfólki | 95 | 96 | 95 | 94 | 92 |
| 90. Vinningsbýti | 29.000 | 29.000 | 93.971 | 17.719 | 17.719 |

**Lýsing av heilsøluliðnum**

91. Brennievni, sum verða innflutt til Føroya verða í løtuni keypt frá **[...]**. Brennievnini koma við skipið úr Rottendam til Føroyar. P/F Magn og P/F Effo hava hvør sín keypssáttmála við **[...]**, men verða innkeypini tó samskipað soleiðis, at tey í stóran mun koma til Føroya í sama skipi.

92. Føroysku oljufeløgini hava eina býtisavtalu. Avtalan loyvir feløgunum at samskipa sínar goymslur, t.e. at útflýggja brennievni frá goymslunum hjá hvørjum øðrum. Samfelagsligi fyrimunurin við hesum er, at innflutningur og goymsla av brennievnum kann fara fram á fulldyggasta hátt.

93. Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit av goymsluni hjá føroysku oljufeløgunum. Tølini er tikin úr frágreiðingini hjá Kappingareftirlitinum av føroyska oljumarknaðinum í 2016. Kappingareftirlitinum kunnugt eru goymslurnar ikki øktar fram til í dag, men hava bæði feløgini gjørt avtalu við Runavíkar kommunu um at vaksa goymslurnar í Søldarfirði. Sambært ársroknskapinum hjá P/F Effo væntar felagið, at goymslan í Søldarfirði kann takast í nýtslu í 2025.

94.

**3.1.A: Yvirlit yvir goymslurnar hjá P/f Magn**

| Fermetrar ($m^3$) | Gassolja | Bensin | Diesel |
|---|---|---|---|
| Klaksvík | 4.100 | 500 | 0 |
| Tórshavn | 2.400 | 0 | 2.400 |
| **Samlaður kapasitetur** | **6.500** | **500** | **2.400** |

Kelda: P/f Magn

**3.1.B: Yvirlit yvir goymslurnar hjá P/f Effo**

| Fermetrar (m3) | Gassolja | Bensin | Diesel |
|---|---|---|---|
| Søldarfjørður | 5.900 | 1.650 | 0 |
| Tórshavn | 4.900 | 0 | 0 |
| Tvøroyri | 4.000 | 350 | 0 |
| **Samlaður kapasitetur** | **14.800** | **2.000** | **0** |

Kelda: P/f Effo

95. Tað er landið, sum eigur tangarnar í Søldarfirði. Landsverk umsitur hesar tangarnar vegna Fíggjarmálaráðið.

96. Í kanningini hjá Kappingareftirlitinum í 2016 varð staðfest, at goymslurnar í Føroyum vóru lutfalsliga lítlar sammet við nýtsluna. Eitt nú setur IEA (International Energy Agenct) limalondum sínum krøv, at tey altíð hava goymslur, sum svara til 90 dagar. Í kanningin var mett at goymslurnar í Føroyum við nýtsluni í 2013 í mesta lagi vóru til 50 dagar. Í sambandi við at goymslurnar ikki eru vaksnar fram til 2022, og at nýtslan er farin upp, metir Kappingareftirlitið, at goymslurnar varða styttri í dag.

97. Í 2013 var samlaði innflutningurin av brennievni 257.816 tons, meðan innflutningurin var 299.472 tons í 2022.

## Innflutningurin av brennievni til Føroya

98. Talvan niðanfyri vísir árliga innflutningin av brennievni til Føroya frá 2016 fram til 2022. Tølini eru fingin frá Hagstovu Føroya.

| Innflutningur av brennievni (tons) 2016-2022 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
| **Bensin** | 10.943 | 11.545 | 10.330 | 10.885 | 10.782 | 11.144 | 10.192 |
| **Diesel** | 25.956 | 25.725 | 28.631 | 26.462 | 24.830 | 23.104 | 20.599 |
| **Gassolja** | 197.492 | 187.057 | 188.825 | 173.878 | 178.130 | 163.733 | 144.174 |
| **Tungolja** | 65.080 | 118.134 | 135.174 | 119.053 | 123.763 | 101.425 | 70.318 |
| **Tilsamans** | **299.472** | **342.462** | **362.960** | **330.278** | **337.504** | **299.405** | **245.282** |

99.

100. Í 2016 var innflutningurin av bensin 10.192 tons, meðan innflutningurin vaks til 10.943 tons í 2022. Talan er um ein vøkstur upp á leið 6,9%.

101. Fyri diesel er vøksturin í innflutninginum farin úr 20.599 tonsum í 2016 til 25.956 tons í 2022. Fyri hesi ár er talan um ein vøkstur uppá 20,6%. Síðan 2020 er innflutningurin av diesel tó lækkaður 2.675 tons fram til 2022.

102. Innflutningurin av gassolju er øktur góð 27% árini 2016 til 2022. Í 2016 var innflutningurin 144.174 tons, meðan innflutningurin í 2022 var 197.492 tons í 2022. Talan er um ein vøkstur uppá 53.318 tons hesi ár.

103. Innflutningurin av tungolju hevur verið skiftandi árini 2016-2022. Í 2016 vórðu 70.318 tons innflutt til Føroya, meðan 65.080 tons vórðu innflutt í 2022. Árini 2017 til 2021 vórðu í miðal 119.510 tons av tungolju innflutt til Føroya árliga.

104. Yvirskipað kann sigast, at um hugt verður at gongdini seinastu tvey árini, t.e. 2021-2022, so sæst, at innflutningurin av bensini er lækkaður nakað, meðan sera avmarkaður vøkstur hevur verið í innflutninginum av diesel. Kappingareftirlitið metir, at ein orsøk til hetta kann vera, at alsamt fleiri velja at keypa sær ein el-bil í dag.

105. Hinvegin er innflutningurin av gassolju vaksin 5% árini 2021-2022, meðan innflutningurin av tungolju í sama tíðarskeiði er lækkaður við eini helvt. Lækkingin í innflutninginum av tungolju vísir seg tó ikki beinleiðis aftur í innflutninginum av gassolju, sum ikki er hækkaður samsvarandi í sama tíðarskeiði.

106. Um hugt verður at samlaðu tølunum fyri innflutninginum av brennievni seinastu trý árini, t.e. 2020-2022, so sæst, at samlaði innflutningurin er lækkaður lutfalsliga nógv. Í 2020 var samlaði innflutningurin av brennievni 362.960 tons, meðan innflutningurin var 299.472 tons í 2022.

107. Samlaði innflutningurin av brennievni er sostatt lækkaður 17,5% árini 2020-2022, og gevur hetta møguliga eina samlaða ábending um, at føroyski orkutørvurin flytur seg framímóti grønari orkukeldum.

108. **Sølan av brennievni til sjóvinnuna**

109. Av teirri orsøk, at ávíst eigarasamanfall verður í føroysku oljufeløgunum eftir ætlaðu yvirtøkuna, og hesir aktørar í størri mun eru virknir í sjóvinnuni, hevur Kappingareftirlitið biðið um upplýsingar frá føroysku oljufeløgunum, sum vísa hvussu stórur partur av seldum nøgdum og umsetningi stavar frá kundum í sjóvinnuni.

110. Tøl, sum Kappingareftirlitið hevur fingið frá føroysku oljufeløgunum vísa, at kundar í sjóvinnuni keyptu í miðal áleið **[...]**% av seldum nøgdunum í 2022, og at hetta svaraði til áleið **[...]**% í miðal av samlaða umsetninginum av brennievni hjá føroysku oljufeløgunum í 2022.

111. **Marknaðarpartar hjá føroysku oljufeløgunum**

112. Í kanningini av føroyska oljumarknaðinum í 2016, staðfesti Kappingareftirlitið, at marknaðarpartarnir hjá báðum oljufeløgum í Føroyum vóru nærum líka stórir árini 2009-2014. Kappingareftirlitið metti, at talan var um ein støðugan markað við avmarkaðum flytiføri.

113. Kappingareftirlitið hevur í mun til viðgerð av hesi yvirtøku ikki innsavnað tøl fyri, hvussu stóran part av innflutninginum føroysku oljufeløgini, hvør sær, hava innflutt frá 2016 til 2022.

114. Kappingareftirlitið hevur hinvegin valt at nýta nettosøluna hjá føroysku oljufeløgunum árini 2016 til 2022 sum grundarlag at gera eina meting av marknaðarpartinum hjá feløgunum í hesum tíðarskeiði.

115. Í yvirlitinum niðanfyri sæst nettosølan hjá ávíkavist P/F Magn og P/F Effo árini 2016 til 2022:

| Marknaðarpartur í kr. í mun til nettosølu (t.kr) | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P/F Magn | 1.493.140 | 893.496 | 667.338 | 923.832 | 850.064 | 767.762 | 690.149 |
| P/F Effo | 1.598.825 | 972.190 | 770.181 | 920.364 | 907.575 | 731.602 | 537.558 |
| 116. Tilsamans | 3.091.965 | 1.865.686 | 1.437.519 | 1.844.196 | 1.757.639 | 1.499.364 | 1.227.707 |

| Marknaðarpartur í % í mun til nettosølu | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P/F Magn | 48 | 48 | 46 | 50 | 48 | 51 | 56 |
| 117. P/F Effo | 52 | 52 | 54 | 50 | 52 | 49 | 44 |

118. Sambært tølunum í talvunum omanfyri, so ger nærum sama býti seg galdandi í dag, sum tá kanningin hjá Kappingareftirlitinum varð almannakunngjørd í 2016. Tølini vísa, at bæði oljufeløgini hava áleið helmingin av marknaðinum hvør, og at flyting í marknaðarpørtunum er avmarkað árini 2016 til 2022. Marknaðurin hjá P/F Effo hevur verið eitt lítið vet omanfyri marknaðarpartin hjá P/F Magn hesi ári.

119. **Kappingin á føroyska oljumarknaðinum**

120. Í 2016 almannakunngjørdi Kappingareftirlitið eina frágreiðing við heitinum "Oljumarknaðurin í Føroyum – Frágreiðing um søluna av brennievni í Føroyum.". Kanningin fevndi um eina støðumeting av føroyska oljumarknaðinum, hví marknaðurin var sum hann var, og hvørt kappingarfremjandi tiltøk áttu at verða sett í verk til tess at stimbra kappingina.

121. Í kanningini vóru nakrar av niðurstøðunum hjá Kappingareftirlitinum, at vinningurin hjá føroysku oljufeløgunum av sølu av diesel og gassolju var ov høgur, og at bruttovinningurin og avkastið hækkaði munandi eftir, at feløgini vóru seld í 2007 og 2008. Kappingareftirlitið staðfesti at avkastið hjá føroysku oljufeløgunum var munandi hægri enn hjá líknandi norðurlendskum feløgum.

122. Kappingareftirlitið var av teirri fatan, at hækkingin í bruttovinningunum, sum var farin fram síðani 2008, ikki kundi knýtast at serligum kostnaðum hjá føroysku oljufeløgunum, men hinvegin at marknaðarbygnaðurin við einum duopoli og vantandi kapping hevði gjørt tað møguligt hjá oljufeløgunum at hækka vinningin.

123. Í frágreiðingin vísti Kappingareftirlitið á, at neyðugt var við átøkum, sum varandi kundu broyta kappingina á føroyska oljumarknaðinum. Kappingareftirlitið skeyt upp loysn at áleggja verandi oljufeløgunum eina samhandilsskyldu, soleiðis at nýggir aktørar, í fyrstu syftu, sluppu undan at gera íløgur í heilsøluliðið. Verandi aktørar skuldu tó fáa fulnað fyri teir kostnaðir, sum heilsøluliðið hevur.

124. Kappingareftirlitið mælti politisku skipanini til at seta slíka skipan í verk.

125. Hóast nøkur ár eru fráliðin, síðan oljufrágreiðingin varð almannakunngjørd, og at tað enn ikki eru komnir nýggir aktørar á føroyska oljumarknaðin, hevur Kappingareftirlitið tó fylgt væl við gongdini á føroyska oljumarknaðinum.

126. Í 2022 almannakunngjørdi Kappingareftirlitið eitt yvirlit á heimasíðu Kappingareftirlitsins, har samanbering verður gjørd millum listaprísin í Føroyum og rávøruprísin (Brent). Tølini, sum Kappingareftirlitið hevur innsavnað vísa, at munurin millum keypsprís og søluprís tykist at verða øktur síðan oljufrágreiðingina frá 2016.

## 3. Meting

127. Í § 15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, sum skal brúkast í sambandi við viðgerð av eini yvirtøku. Sambært ásetingini skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast. Hinvegin skal ein yvirtøka, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, forbjóðast.

### Marknaðarpartar og miðsavnan

128. Størri marknaðarpart ein fyritøka hevur á viðkomandi marknaði, tess størri eru sannlíkindini fyri, at fyritøkan hevur marknaðarvald, og tess meira ein samanlegging økir um marknaðarpartin hjá fyritøkuni, tess størri eru sannlíkindi fyri, at fyritøkan fær størri marknaðarvald. Somuleiðis er galdandi, at tess størri sølugrundarlagið er, tess størri eru sannlíkindi fyri, at ein príshækkan vil verða lønandi fyri fyritøkuna, hóast seldu nøgdirnar minka.

129. Yvirtøkan hjá Sp/F Frá 27. Juni 2007 av 41,71% av partapeninginum í Sp/F Orkufelagið hevur ikki ávirkan á galdandi marknaðarbýti millum P/F Magn og P/F Effo. Talan er ikki um eina vatnrætta yvirtøku, har virksemið hjá P/F Magn og P/F Effo verður lagt saman í eitt felag, og yvirtøkan hevur tískil heldur onga broyting við sær í mun miðsavningina á føroyska oljumarknaðinum.

130. Mett í mun til nettosølu, hava føroysku oljufeløgini áleið helmingin av marknaðinum hvør.

**Eigarasamanfall og ræði**

131. Hóast talan ikki er um eina samanlegging av verandi aktørum á føroyska oljumarknaðinum, er tó ávíst samanfall millum eigararnar í báðum feløgunum eftir ætlaðu yvirtøkuna.

132. Eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 koma eftir ætlaðu yvirtøkuna at eiga 41,71% í Sp/F Orkufelagið, 15,48% í P/F Tjaldur og 0,77% í P/F Effo.

133. Eigararnir handan Sp/F Framinvest eiga **[...]** % í Sp/F Orkufelagið, **[...]**% í P/F Tjaldur og **[...]** % í P/F Effo.

134. Eigararnir handan P/F Kimbil eiga **[...]**% í Sp/F Orkufelagið og **[...]**% í P/F Tjaldur.

135. Eigarnar handan P/F Poul Hansen eiga **[...]**% í Sp/F Orkufelagið og **[...]**% í P/F Effo.

136. Eigararnir handan P/F N. J. Mortensen eiga **[...]**% í Sp/F Orkufelagið, **[...]**% í P/F Tjaldur og **[...]**% í P/F Effo.

137. Sp/F Orkufelagið eigur 100% av partapeninginum í P/F Magn.

138. Sambært ársroknskapinum hjá P/F Effo fyri 2022, hevur P/F Tjaldur og Kolan Aps avgerandi ávirkan á P/F Effo. P/F Tjaldur eigur 100% av Sp/F Kolan, sum eigur 68,51% av Kolan Aps. Kolan Aps eigur 51,9% í P/F Effo, meðan Sp/F Kolan eigur 3,33% av P/F Effo.

139. Um sæð verður burtur frá eigarasamanfallinum hjá Sp/F Frá 27. Juni 2007 í báðum feløgunum eftir ætlaðu yvirtøkuna, so sæst, at eigarasamanfallið hjá hinum eigarunum í báðum oljufeløgunum er lutfalsliga avmarkað. Kappingareftirlitið metir tískil ikki, at ognarluturin hjá hesum eigarunum einsæris er nóg mikið til at hava avgerandi ávirkan á feløgini á føroyska oljumarknaðinum.

140. Til tess at meta um, hvørt eigararnir av Sp/F Frá 27. Juni 2007 koma at hava avgerandi ávirkan á feløgini á føroyska oljumarknaðinum, hevur Kappingareftirlitið gjørt meting av teirra ávirkan og ræði í ávikavist Sp/F Orkufelagið og P/F Tjaldur.

141. <u>Sp/F Orkufelagið</u>

142. 32 eigarar eru í Sp/F Orkufelagið. Lutfalsliga stórur munur er á eigaralutfallinum í Sp/F Orkufelagið. Eftir ætlaðu yvirtøkuna verður Sp/F Frá 27. Juni 2007 størsti parteigari við 41,71%. Ognarluturin hjá næststørsta parteigara, Sp/F Arcus Invest er **[10-20]**%. 5 parteigarar eiga millum **[0-5]**% og **[5-10]**%, meðan 25 parteigarar eiga millum **[0-5]** og **[0-5]**%.

143. Eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 eiga ikki ognarlut í nøkrum av hinum partaeigarunum í Sp/F Orkufelagið.

144. Hóast Sp/F Frá 27. Juni 2007 verður størsti parteigari í Sp/F Orkufelagið eftir ætlaðu yvirtøkuna, so fær felagið ikki lim í nevndina í Sp/F Orkufelagið. Sambært eigaraavtalu dagf. 29. desember 2021, sum allir parteigarar hava undirskrivað, eru parteigararnir samdir um, at Sp/f Arcus Invest og Hólmi Efh hava rætt til at velja ein nevndarlim í part, meðan Tommy Næs Djurhuus, Teitur Poulsen og Ben Arabo saman kunnu velja ein nevndarlim, sum samstundis verður nevndarformaður í Sp/F Orkufelagið. Nevndin í Sp/F Orkufelagið setir stjóran í felagnum.

145. Eingin av parteigarunum í Sp/f Orkufelagið hevur vetorættindi, og kann eigaraavtalan, sum allir parteigarar hava undirskrivað bert broytast um 70 % av eigarunum eru fyri.

146. Um parteigari í Sp/F Orkufelagið velur at selja sín ognarlut, hava verandi parteigarar forkeypsrættindi í mun til teirra ognarlut.

147. Samanumtikið metir Kappingareftirlitið, at talan er um felagsræði í Sp/F Orkufelagið, og at eingin einstakur parteigari einsæris hevur avgerandi ávirkan á felagið.

148. <u>P/F Tjaldur</u>

149. Sambært upplýsingum, sum Kappingareftirlitið hevur innsavnað fyri P/F Tjaldur, so eru áleið 2300 eigarar í P/F Tjaldur. Stórur munur er á eigaralutfallinum í Sp/F Tjaldur og eiga 30 teir størstu parteigararnir áleið 93% av partapeninginum.

150. Eigararnir handan Sp/F 27. Juni 2007 eiga tilsamans 15,48% av partapeninginum í P/F Tjaldur. Aðrir av størru parteigarunum eru: Inkerman Holding AS við 19,94% Grunnurin til minnis um Zacharias Niclasen við 16%, Rúni M. Hansen við 19,94% og GMT Holding ApS við 10%.

151. Hetta merkir, at 5 teir størstu eigararnir í P/F Tjaldur eiga 81,36 % av partapeninginum.

152. Í sambandi við hesa yvirtøku hevur Kappingareftirlitið innsavnað upplýsingar frá 5 teimum seinastu aðalfundunum í P/F Tjaldur. Í miðal hevur uppmøtingin til aðalfundirnar verið áleið 82 %. Sambært fráboðara hava eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 møtt til hesar fundir, og hava ikki havt fulltrú at umboða ella greiða atkvøðu fyri aðrar parteigarar í P/F Tjaldur.

153. Eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 hava ongan lim í nevndini í P/F Tjaldur.

154. Tann minnilutaverja, sum er í P/F Tjaldur, er tann, sum Vinnufelagslógin gevur.

155. Út frá upplýsingunum í málinum metir Kappingareftirlitið, at eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 hvørki hava de jure ella de facto ræði í P/F Tjaldur og tískil ikki avgerandi ávirkan á P/F Effo.

**Samskipaður atburður / koordinering**

156. Sannlíkindi fyri samskipan á einum marknaði er størst, um kappingarneytar lætt kunnu koma fram til eina felags fatan av, hvussu samskipanin skal fara fram. Luttakararnir í eini samskipan skulu hava eina felags fatan av, hvat er í tráð við samskipanina, og hvat ikki ikki er í tráð við samskipanina.

157. Í hesum sambandi hevur tað týdning, hvussu nógvar fyritøkur eru á marknaðinum, hvussu nógvar vørur talan er um, hvussu eins fyritøkurnar eru, hvussu eins kundarnir eru og um talan er um ein støðugan eftirspurning.

158. Kappingareftirlitið metir, at ein samskipan á føroyska oljumarknaðum er lutfalsliga løtt, tí talan er um ein duopolitiskan marknað, har lætt er at eygleiða, hvat hin aktørurin á marknaðinum ger. Í sambandi við hesa yvirtøku kann grundgevast fyri, at ein slík samskipan kann gerast léttari, tí eigaraumskarðanin millum feløgini øktist, og harvið kann vera vandi fyri, at upplýsingar vera latnar millum feløgini, sum ger ein samskipan lættari.

159. Nakað annað, sum kann tala fyri, at ein samskipan er lutfalsliga løtt á føroyska oljumarknaðinum er, at feløgini keypa olju frá sama veitara, og at feløgini samskipa innflutning og goymslu. Annað, sum talar fyri, at ein samskipan á føroyska oljumarknaðinum er løtt, er, at talan er um homogenar vørur, og at eftirspurningurin er lutfalsliga støðugur.

160. Kappingareftirlitið metir tí, at ávísur vandi kann vera fyri, at ein samskipan kann gerast lættari við hesi yvirtøku.

161.

**Møguleikarnir hjá øðrum at koma inn á marknaðin**

162. Um tað er lutfalsliga lætt hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi á einum marknaði, eru sannlíkindini fyri, at ein møgulig yvirtøka økir um vandan fyri kappingaravmarkingum framyvir avmarkað.

163. Kappingareftirlitið metir, at byrjunarkostnaðurin hjá nýggju aktørum at byrja virksemi á føroyska oljumarknaðinum er lutfalsliga høgur. Sambært fráboðara er íløgan í tangar og tangabil áleið 30. mió. Umframt hetta krevst fígging til m.a. bygningar og rakstur. Kappingareftirlitið metir tó, at íløgukostnaðurin at byrja virksemi á smásøluliðnum við t.d. ómannaðum støðum er lutfalsliga lægri, men til hetta krevst avtala um veiting av olju frá verandi aktørum

164. Kappingareftirlitið hevur heitt á politiska myndugleikan um at seta tiltøk í verk, sum betra um møguleikan hjá nýggjum aktørum at koma inn á føroyska oljumarknaðin. Eitt av tilmælinum frá Kappingareftirlitinum er at áleggja verandi oljufeløgunum eina samhandilsskyldu.

165. Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan ger umstøður hjá nýggjum aktørum at koma inn á marknaðin verri.

166. Tann 6. juli 2023 bórust tíðindi um, at eitt nýtt oljufelag var sett á stovn í Føroyum, sum brýtur duopolið, sum hevur verið á føroyska oljumarknaðinum.[2]

167. Nýggja felagið eitur Krafta Energy, og eru tað nøkur av størru reiðaríunum í Føroyum, sum eiga felagið saman við Róa Kalsø og Leif Hovgaard. Reiðaríini handan felagið eru: P/F Smyril Line, P/F JFK, Sp/f Framherji og P/F Farcod, sum er felagið aftan fyri P/F Enniberg.

168. Felagið ætlar í fyrsta umfari at selja gassolju til skipaflotan í Føroyum og uttanlands. Fyribils er ætlanin ikki at selja til privata marknaðin, men er felagið ikki avvísandi fyri møguleikanum hjá nýggjum aktørum á smásøluliðnum í Føroyum at brúka nýggja orkufelagið sum heilsøluliđ.

169. Felagið fer undir at byggja oljugoymslur í Føroyum, og verða hesar væntandi klárar at taka í nýtslu ultimo 2024. Til oljugoymslurnar hjá nýggja orkufelagnum standa klárar, fer felagið at virka við oljumekling, og at umsita oljukeyp hjá skipakundum.

**Broytingar í eigaraskarðanum framyvir**

170. Hóast Kappingareftirlitið ikki metir, at Sp/F Frá 27. Juni 2007 einsæris hevur avgerandi ávirkan á hvørki Sp/F Orkufelagið ella P/F Tjaldur, so kann støðan í framtíðini gera, at felagið, antin við uppkeypi av partapeningi ella gjøgnum avtalur kann fáa ræði í øðrum ella báðum feløgum á føroyska oljumarknaðinum.

171. Í hesum sambandi vil talan talan tó gerast um eina ræðisbroyting, sum skal góðkennast av kappingarmyndugleikanum, og kann kappingarmyndugleikin í sambandi við tílíka viðgerð áseta treytir í sambandi við eina møguliga góðkenning.

**Niðurstøða**

172. Kappingareftirlitið metir út frá einari samlaðari heildarmeting, at yvirtøkan hjá Sp/F Frá 27. Juni 2007 av 41,71% av Sp/F Orkufelagið ikki munandi kemur at forða virknu kappingini á føroyska oljumarknaðinum.

173. Niðurstøðan hjá Kappingareftirlitinum byggir millum annað á, at yvirtøkan ikki kemur at ávirka verandi marknaðarbýti millum P/F Magn og P/F Effo, tí talan er ikki um eina yvirtøku, har virksemi hjá báðum oljufeløgunum verður lagt saman, og hevur yvirtøkan tískil heldur onga broyting við sær í mun til miðsavningina á føroyska oljumarknaðinum.

174. Hóast ávíst eigarasamanfall verður í føroysku oljufeløgunum eftir samanlegging, so metir Kappingareftirlitið ikki, at eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 einsæris hava avgerandi

---

[2] https://kvf.fo/greinar/2023/07/06/selja-gassolju-til-skip-i-foroyum-og-uttanlands

ávirkan hvørki í Sp/F Orkufelagið ella í P/F Tjaldur, sum eigur meirilutan í P/F Effo. Eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 eru ikki partur av nevndini í hvørki Sp/F Orkufelagið, P/F Tjaldur ella P/F Effo, og eiga hesir ikki part av nøkrum av hinum eigarunum í Sp/F Orkufelagið ella P/F Tjaldur.

175. Føroyski oljumarknaðurin er eyðkendur við at vera ein duopol marknaðurin við homogenum vørum og støðugum eftirspurningi, og har virksemi hjá oljufeløgunum frammanundan yvirtøkuni í ávísan mun er samskipað gjøgnum býtisavtalu milllum feløgini. Marknaðarstøðan á føroyska oljumarknaðinum ger tískil, at kappingarneytarnir á marknaðinum kennast væl. Hinvegin kann ein samskipaður atburður møguliga gerast lættari við hesi yvirtøkuni, men metir Kappingareftirlitið at styrktu revsiheimildirnar, sum komu við nýggju kappingarlógini, sum kom í gildi 30. mai 2023, hava tálmandi ávirkan á insitamentið hjá fyritøkunum á marknaðinum á ólógiligan hátt at samskipa sína atferð.

176. Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan hevur við sær, at tað verður torførari hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi á føroyska oljumarknaðinum. Kappingareftirlitið metir tó, at neyðugt er við átøkum, sum kunnu stimbra møguleikanum hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi í smásølu. Ásannandi at íløgukostnaðurin at byrja virksemi á marknaðinum er lutfalsliga høgur, hevur Kappingareftirlitið mælt politiska myndugleikanum til áleggja verandi aktørum eina samhandilsskyldu til smásøluliðið.

177. Í tann mun broytingar verða í eigaraskarðanum í føroysku oljufeløgunum framyvir, og at eigararnir handan Sp/F Frá 27. Juni 2007 koma at fáa ræði í føroysku oljufeløgunum, so er talan um eina ræðisbroyting, sum skal góðkennast av kappingarmyndugleikanum. Kappingarmyndugleikin kann í sambandi við tílíka viðgerð áleggja treytir til tess at byrgja fyri møguligum skaðiligum avleiðingum á kappingina.

178. Yvirskipað vil Kappingareftirlitið tískil mæla Kappingarráðnum til at góðkenna yvirtøkuna sambært § 15, stk. 2 í kappingarlógini. Sambært ásetingini skal ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknu kappingini – serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

## Avgerð

179. Kappingarráðið hevur á fundi tann 24. juli 2023 tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna hjá Sp/F Frá 27. Juni 2007 av partabrøvunum hjá Skel Fjárfestingafélag HF í Sp/F Orkufelagið, sambært § 15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini. Góðkenningin er treytað av, at tær upplýsingar, sum luttakandi fyritøkur hava latið eru rættar, sambært § 18 a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingarráðið
Heri Joensen
formaður

Terje Sigurðsson
deildarstjóri